Hesin faldarin greiðir frá tilgongdini, tá ið eldur hevur verið í húsunum.

# Frá *eldi* til *endurbygging*



Hvat ger løgreglan?
Hvat ger Betri Trygging?
Og hvat skalt tú gera?

sendistovan

betri trygging

# 1. *Bráðneyðug hjálp* eftir eldin – og fyrstu kanningarnar

### Hvussu kann Betri Trygging hjálpa tær alt fyri eitt, tá ið eldur hevur verið í?

- At fáa klæði til húskið
- At fáa hendur á neyðugum heilivági
- At fáa tak yvir høvdið, um tú/tit ongastaðni hava at vera
- At flyta tær eitt skundgjald, so tú alt fyri eitt kanst keypa tað, sum er neyðugt til gerandisdagin

### Hvørji viðurskifti kannar Betri Trygging?

- Sethúsatryggingina
- Innbústryggingina
- Møguliga aðrar viðkomandi tryggingar
- Hevur tú – ella annar í húskinum - tørv á sálarfrøðiligari hjálp? So rinda vit fyri sálarfrøðing.

### Hvørji viðurskifti kannar løgreglan?

- Orsøkina til eldin

# 2. Hvat er oyðilagt – og *hvat kann bjargast?*

*Tá ið løgreglan er liðug við sítt kanningararbeiði, byrjar kanningararbeiðið hjá Betri Trygging.*

### Mannagongd, áðrenn vit fara inn í húsini:

- Tú fært ein kontaktpersón hjá Betri Trygging, sum tú altíð kanst seta teg í samband við – og sum javnan fer at ringja til tín komandi tíðina og greiða tær frá tí, sum hendir.
- Vit boða tær altíð frá, áðrenn vit fara inn í húsini fyrstu ferð.
- Tú skalt taka støðu til, um tú vilt sleppa við – ella um tú vilt sleppa undan. Tað er ymiskt, hvat fólk vilja.

### Mannagongd, tá ið vit fara inn í húsini:

- Vit fara inn við størstu virðing. Vit vita, at talan er um títt heim. Vit vita, at tað er sera svárt.
- Vit kanna, hvørt húsini hava fingið partvísan skaða ella totalskaða av eldinum.
- Saman við tær gera vit eina meting av, hvat var inni í hvørjum rúmi. Hevur tú myndir ella annað, er tað ein stór hjálp.
- Vit kanna, hvørji ting kunnu bjargast.
- Tú mást taka støðu til, um okkurt innbúgv hevur serliga stóran kensluligan týdning. So gera vit alt, vit kunnu, fyri at bjarga tí.

### Mannagongd, tá ið vit hava verið inni í húsinum

- Vit syrgja fyri, at ting og klæðir, sum kunnu bjargast, verða vaskað og reinsað. Síðani goyma vit innbúgvið fyri teg, inntil tú aftur kanst taka ímóti tí.

# 3. *Endurbygging og endurgjald*

### Tá ið húsini skulu byggjast upp aftur ella umvælast:

- Hevur tú áræði og orku til at vera byggiharri, tá ið húsini skulu byggjast uppaftur ella umvælast, ert tú vælkomin til tað. Um ikki, heita vit á teg um at finna onkran, sum kann standa fyri endurbyggingini fyri teg.
- Vit eru altíð klár at sparra og hjálpa, um ivamál stinga seg upp.

### Endurgjald, tá ið húsini gerast totalskadd:

- Eru húsini rætt tryggjað – og vanliga viðlíkahildin - fært tú altíð fult endurgjald frá Betri Trygging, um húsini verða totalskadd. Tað merkir, at um tú hevur tryggjað húsini fyri nývirðið, rinda vit altíð fyri at byggja eini eins hús uppaftur.
- Er innbúgvið rætt tryggjað – tað vil siga, um tú hevur tryggjað innbúgvið fyri ta upphædd, sum tað veruliga er vert – endurrinda vit altíð fulla virðið á tí innbúnum, sum tú hevði undan eldinum.

### Endurgjald, tá ið hús og innbúgv verða partvíst skadd

- Gerast húsini partvíst skadd, fært tú altíð endurgjald fyri tað, sum má vrakast, um tú hevur tryggjað hús og innbúgv rætt.

***Tú ert altíð vælkomin at seta teg í samband við okkum. Vit hjálpa tær fegin.***

Ring **348 600** ella skriva **betri@trygging.fo**

betri trygging